














# Snøggur handil og marglætisíbúð

Dreymurin kann gerðast veruleiki: Tú kanst búgva í marglæti í erva og dríva handilsvirksemi í neðra – alt á einum stað.

## Fyrsta fatanin

Gongur tú í virknu handilsgøtuni, fært tú straks varhugan av, at her er talan um eina serstaka ogn. Tú sært ein sera snøggan og væl bygdan bygning út til vegin. Tað er óivað handilin, tú fyrst fært eyga á, men lat teg ikki tøla. Har er mikið meira, enn tú fatar við fyrsta eygnakasti, og tá tú fert upp í íbúðina, fært tú ein rættiligan hvøkk, at nakað so vakurt kann liggja mitt í "gomlu" Havnini.

## Handilin

Alt er sera opið, ljóst og snøgt. Handilin er rúmligur, aftanfyri er skrivstova og hvíldarrúm, og tú kanst fara út á terassuna at njóta ein kaffimunn, tá ið tú hevur ein steðg.

## Íbúðin – inni og úti

Tá tú kemur uppá, er ein sera snøgg og íbúð, har alt er nýtt. Stílurin er sera snøggur og strammur – sum tikin úr BoBedre. Tú kanst fara út á ovaru terassuna at eta, hugna tær og njóta frálíka útsýnið yvir gomlu Havnina. Her er lætt at njóta lívið. Í hjúnarúminum er egið wc, og í stóra alrúminum við stovu, borðstovu og køki er lætt at innrætta seg fjálgt og hugnaligt, tí har eru skot og horn og nakað av skrálofti.

## Kjallarin

Í kjallaranum er egin inngongd, har tú kanst sleppa til við vørubili. Tú eigur plássið niðanfyri, og pláss er til uml. 4 bilar fram við húsinum. Annars er fýrrúm, wc, trappuuppgongd, eitt minni og eitt stórt goymslurúm.

## Innrætting

Í miðhæddini er inngongd, handilshøli, millumgongd, verkstaður, køkur / skrivstova / stova / garderoba / starvsfólkarúm. Sjálvstøðug inngongd og durur til ovaru hædd og møguleiki fyri at ganga upp innan er eisini. Í erva er trappuuppgongd, gongd, baðirúm / vaskirúm, hjúnarrúm við egnum wc og útgongd til terassu við útsýni yvir býin, køkur / alrúm / borðstova / stova, kamar / stova. Í niðastu hædd er inngongd, goymslurúm, fýrrúm, stórt goymslurúm, wc, trappuuppgongd.

## Niðurstøða

Talan er um eina heilt serstaka ogn, ið stendur út til høvuðshandilsgøtu í miðbýnum í Havn, og sum í erva hevur frálíkt útsýni yvir gomlu Havnina og Vestaruvág. Útsýnið er heilt einastandandi, og tú kanst fara út í øllum hæddum at njóta veðrið. Bygningurin er innrættaður av nýggjum og kann væl nýtast til mong ymisk endamál og mangt ymiskt (handilsligt) virksemi. Møguleiki er fyri at byggja eina fulla hædd afturat.

**Fakta**
Dr. Jakobsensgøta 9, Tórshavn
Byggiár: 1987 & 2007
Hæddir: 3
Gólvvídd: 370 fermetrar
Grundøki: 205 fermetrar
Prísuppskot: 8.000.000,00

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni